# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Heri Niclasen 60 ár

Í dag fyllir ein vælkendur Tvøroyramaður og suðringur, Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráðnum 60 ár. Heri er úr góðum bergi brotin úr báðum ættum. Tað sera skemtliga og framúr hittinorðaða man hann tó hava frá faðirinum, Herlufi hjá Rudolf. Sum ungur telegrafistur starvaðist Heri í Grønlandi eitt nú í Qeqertassuaq ella Godhavn heilt har norðuri í Diskovíkini. Hetta vóru hendingarík og spennandi ár, og ein fragd er tað at hoyra Hera siga frá hesum árum.



Heri hevur eisini starvast hjá Lyngby Radio, men mest er hann tó kendur fyri sítt stóra og slóðbrótandi arbeiði fyri føroyska ferðavinnu. Hann byrjaði hjá Smyril Line og síðan gekk leiðin til Atlantic Airways fyri síðan at enda í stjórasessinum á Ferðaráð Føroya - ein tignarlig og væluppiborin starvsleið eftir rættiliga stutt skeið. Heri er vældámdur og góður starvsfelagi og uttan mun til hvat starv talan er um, so hevur virksemi hansara verið eyðkent av samstarvsvanda, góðum hugskotum, hugflogi, nýhugsan og áræði.

Heri Niclasen ger ofta vart við seg á sín bersøgna og sermerkta hátt, sum tá hann á ráðstevnu um føroyska ferðavinnu suðuri í Vági í mai 2004 legði fram eina sera fjølbroytta og visionera ætlan fyri nýtlsuna av nýggja Smyrli. Hann mælti til nýhugsan og til at sleppa gamlari vanahugsan. Tað var á hesi ráðstevnu, at Heri endaði sína frálíku framløgu við á sín vælkenda lætta og skemtiliga hátt sláa fast, at ”Nýggi Smyril skal verða Føroya størsta kassatól!” Betri kundi tað ikki sigast. Jú, Heri dugir at taka til. Og betri ráð kundi eingin havt givið Strandferðsluni.

Heri Niclasen er ein dugnaligur og visionerur ferðavinnumaður. Undir hansara leiðslu hevur Ferðaráðið ment seg og funnið sítt pláss í samfelagnum og í mun til privatu og almennu ferðavinnuna. Hann hevur í hesum sambandi fleiri álitistørv, og er hann eitt nú limur í nevndini fyri Fitur. Tað er eingin einføld og løtt uppgáva at standa á odda fyri føroyskari ferðavinnu. Føroyingar vilja bæði hava turismu og ikki hava turismu. Hetta skilir Heri sum fáur. Hann kennir land og fólk og veit væl, at eitt so lítið land við eini viðbreknari náttúru og sermerktari mentan tolir bert eitt ávíst tal av turistum. Tað ræður um at finna javnvágina og at fáa sum mest burturúr til ferðavinnu og samfelag úr hesari javnvág. Her hevur Heri sýnt bæði vit og skil og at duga væl at stýra millum skerini.

Privat er Heri ein vinsælur, blíður og framúr skemtiligur maður, samstundis sum hann innast inni er ein sera álvarsamur maður. Hetta er eitt lyndiseyðkenni hansara og hann veit, at livið er bland av gaman og álvara. ”Søtt og beiskt er bland mær lutað” sum sálmaskaldið sigur. Heri er ein sannur meistari at siga frá og dugir væl at skifta millum gaman og álvara. Hesi evni hansara eru dømi um eitt frásøgukynstur, sum eyðkendi partar av gomlu mentanini í Føroyum. Hetta er eitt kynstur, sum er við at hvørva, og sum tey lærdu nú leita eftir við ljós og lykt. Tey kundu lært nógv av Hera. Heri er hittinorðaður sum fáur og hetta hevur hann sum kunnugt ikki frá fremmandum. Men Heri kennir sum flestøll menniskju eisini til lívsins álvara og til menniskjans beisku kor. Fáur dugur sum hann at greiða frá stríðnum hjá fólki á Tvøroyri fyri betri lívskorum og fyri rættinum til eitt gott og trygt lív. Hetta hevur hann heldur ikki frá fremmandum. Heri er á mangan hátt eitt sjáldsamt menniskja - ein av hesum, sum tú fert frá ríkari í sinninum, enn tá tú kom. Vit eru mong, sum ynskja Hera Niclasen hjartaliga tillukku, nú hann fer um tey sekstiog ynskja alt tað besta.

Føðingardagin er Heri burturstaddur.

**Vinir**

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Kistan við Lydiu Mohr**, Tórshavn, fer úr kapellinum á Landssjúrkshúsinum í dag kl. 18. Jarðarferðin verður mikudagin 18. januar kl. 13 úr Havnar kirkju.

Kistan við **Astrid Samuelsen av Tvøroyri**, fer úr sjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18:00 í Salem. Jarðarferðin verður úr Salem hósdagin 19. januar kl. 13. Tey ið vilja minnast Astrid kunnu lata Zarepta eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

**Rosia Vestergaard, Sumba**, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist Mánadagin 16. januar, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður 24. januar úr Jesukirke í Valby kl. 13.

### Dagurin í morgin

**18. januar. Prisca.** Ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir. Gomlu jól enda, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum. Dagurin verður eisini róptur gamli trettandi. Vilt tú verða ríkur, skal tú gomlu trettandu nátt ganga út og sita á kjørbreyt.
Magnus Heinason varð hálshøgdur hendan dagin í 1589.

## Mogens Lützen

**20. sept. 1909 - 12. jan. 2006**

Hósdagin í farnu viku andaðist Mogens Lützen, Tórshavn, 96 ára gamal. Tá Ellen og Mogens Lützen í fjør heyst høvdu verið gift í 73 ár, skrivaði FF-blaðið, at hetta var longsta hjúnarlag, nakar veit um at siga í Føroyum.



5 vóru børnini í hjúnalagnum: Valdemar, Anni, Kim, Eydna og Herluf, sum doyði í 80-unum. Eisini vaks systursonurin hjá Ellen, Ellindur, upp hjá teimum.

Mogens og Ellen giftust í 1932, sama ár sum Mogens kom aftur úr Keypmannahavn, har hann hevði verið á handilsskúla. Mogens var alla ævi sína í familjufyritøkuni Valdemar Lützen, hann tók við sum stjóri eftir pápan, tá var hetta ein tann størsti brenni- og tilfarshandil í Føroyum.

Síðan 1954 til fyri stuttum, hevði fyritøkan p.f. Valdemar Lützen eisini ísinkram- og glasvøruhandil í gomlu handilshølunum hjá Z. Heinesen í Vágsbotni.

Mogens Lützen var kendur vinnulívsmaður, álitismaður í fleiri tíðandi vinnulívsnevndum.

Tá heimsbardagin brast á, varð Mogens saman við Robert Brockie enskur varakonsul. Valdemar og Mason vóru enskir konsular í Føroyum. Mason hevði skrivstovu hjá Valdemar Lützen. Tað er óneyðugt at siga, at hetta hava verið týdningarmiklir sessir undir bretsku hersetingini.

Mogens sigldi undir krígnum fleiri túrar til Onglands við tangabátum, sum sigldu til Føroyar. Hesar ferðir vóru í handilsørindum og eisini í konslaørindum.

Tað kann verða nevnt, at teir fýra sum røktu konslastarvið, vóru samdir um, at føroyska flaggið skuldi góðkennast, og sendu teir fjarrit til London við hesum boðum. Hetta hevur havt sína vekt og er eisini ein partur av okkara flaggsøgu.

Seinni varð Mogens franskur konsul, til sonurin Valdemar tók yvir. Valdemar legði hetta átilisstarv frá sær, tá hann fylti 70 ár í 2003.

Mogens var eini 25 ár, fram til 1980, nevndarlimur í Føroya Banka. Her var hann kendur sum álitismaður.

Mogens var leingi virkin limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag. Í bókini hjá hesum feløgum “Semjur og Stríð”, fær Mogens tað skoðsmál, at hann var ein ein trúfastur limur.

Ellen og Mogens búðu øll árini í Sigmundargøtu, tá foreldur Mogens vóru farin av foldum, fluttu tey í vøkru húsini í Sigmundargøtu 7, sum H.C.W. Tórgarð teknaði og smíðaði í 1927. Har búðu tey, til tey nú fluttu á Lágargarð.

✝

Sagt verður frá at kæra kona, mamma og omma okkara

**Lydia Mohr**
Tórshavn, ættað úr Hvalvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 14. januar, 66 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 17. januar kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin 18. januar kl. 13.00.

**Jákup Andrias**
**Torstein, Uni og Rókur**

Sosialurin
www.sosialurin.fo